# Plátan kundi rakt mannin



Í nógva vindinum mikumorgunin feyk ein aluminiumspláta á ein bil á Lambareiði, men plátan fór ikki inn gjøgnum rútin.

Fleiri storm- og vatnsskaðar hendu mikudagin, ikki minst í Eysturoynni.

Ein bilføari var fyri einum óhappi, sum tó endaði heppið.

Tá ið hann kom eftir Lambareiði, kom ein stór aluminiumspláta flúgvandi gjøgnum luftina. Plátan rakti bilin og fór so aftur við bilinum. Hevði plátan farið gjøgnum rútin, hevði verið verri vorðið.

Funnið varð fram til, hvaðani plátan kom, og eigarin á virkinum hevur játtað at geva sítt ískoyti til at fáa bilin umvældan.



# Elin og Jóhann við nýggjari dokumentar

Bismarin er heitið á nýggjari útvarpssending, sum er ein dokumentarsending við kjaki aftaná.

Tann fyrsti Bismarin vigar fortreytirnar fyri, at føroysk fiskavøra kann verða seld uttanlands í framtíðini fyri góðan prís. Skulu føroyskar fiskavørur aftur verða seldar í kendu handilsketunum í t. d. Bretlandi er neyðugt, at føroysk fiskavøra fær góðkenning sum burðardygg vøra.

Bismarin er á skránni mánadag klokkan 17.05. Beinleiðis kjak byrjar klokkan 17.30.

Tað ber til hjá lurtarum at ringja og siga sína hugsan um evnið.

Útvarpsfólkini Elin Winther Poulsen og Jóhann Mortensen leggja tilrættis.



# Danmark og Grønland ósamd um Arktis

**TÓNLEIKUR** Danmark og Grønland draga ikki eina línu íkappingini um rættin til leiðirnar við Norðpólin

Barbara Holm

Danmark og Grønland draga ikki eina línu í kappingini um rættin til leiðirnar við Norðpólin. Tað stendur at lesa í einari nýggjari bók, sum danski tíðindamaðurin Martin Breum hevur skrivað.

Høvundurin skrivar í bókini, at sum er er tað danskt-grønlendska stríðið grundað á, hvat skal henda, um Danmark vinnur tað diplomatiska stríðið um rættin til økið við pólin.

– Men tað er als ikki vist, at teir grønlendsku politikararnir fara at góðtaka, at leiðin við Norðpólin skal hoyra til ríkisfelagsskapin, skrivar Martin Breum. Í sambandi við bókina hevur hann tosað við grønlendska landsstýrisformannin, Kuupik Kleist, sum heldur, at Norðpólurin eigur at fáa somu støðu sum Suðurpólurin, ið er eitt slag av einum friðaðum ongamannalandi.

- Tað hevði verið óført, um vit kundu fingið semju um, at Norðpólurin hoyrir til mannaættina, og at hann verður friðaður fyri ymiskt virksemi so sum hernaðarligt virksemi, sigur Kuupik Kleist í bókini. Sambært Martin Breum hevur danska stjórnin eina heilt aðra áskoðan, tí hennara mál er at gera Norðpólin danskan, skrivar hann.

Men sambært kanadiska Arktis-serfrøðinginum Michael Byers fer hvørki Danmark, Kanada ella Russland at vinna stríðið um Norðpólin.

- Einki land kann eiga sjógvin og havísin. Stríðið hjá dønum, kanadamonnum og russum um Norðpólin snýr seg meiri um tjóðskaparligan stoltleika og innanríkispolitikk, sigur hann í bókini hjá Martin Breum, sum eitur "Når Isen Forsvinder"



*Kuupik Kleist heldur, at Norðpólurin skal skipast sum eitt friðað eins og Suðurpólurin*

# Uppboðssøla fyri Rumenia

**NEYÐHJÁLP** Í morgin verður uppboðssøla av málningum í Klingruni hjá Føroya Tele í Hoyvík, til farma fyri Rumeniaverkætlan hjá Tekninska Skúla í Tórshavn

Í morgin, leygardagin, verður uppboðssøla av málningum, sum listafólk hava latið, í Klingruni hjá Føroya Tele í Hoyvík, til frama fyri Rumenia Verkætlanina hjá Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

Endamálið við Verkætlanini er at geva næmingum á Tekniska Skúlanum eina námsferð, sum er fakliga viðkomandi, innlit í aðra mentan og at fremja hjálpararbeiði í Rumenia.

Tað eru tveir flokkar, maskinlærlingar og klædnaatstøðingar, sum fara avstað 2. apríl. Leiðin gongur til lítlu bygdina Jebel. Her fara maskinlærlingar at bøta um viðurksifti hjá íbúgvum og á skúlanum. Klædnaatstøðingarnir hava seymimaskinur við. Ætlanin er, at læra tey at nýta hesar og seyma klæðir um, soleiðis at klæðini passa. Seymimaskinurnar verða latnar íbúgvunum.

Við hesum fáa næmingarnir eina øðrvísi uppliving, og sleppa at royna seg í verki í veruliga lívinum.



Dyrnar lata upp klokkan 13, har møguleiki er at siggja málningarnir. Livandi tónleikur verður á skránni og eisini okkurt lætt til matna. Sjálv uppboðssølan byrjar klokkan 14, og er tað Bjørn á Heygum ið skipar fyri.

Tey, ið hava latið málningar til uppboðssøluna, eru:

Kári Svensson, Øssur Mohr, Berit Norðoy, Gunnar Streymoy, Archibald Black, Eli Smith, Vera Mørkøre, Jón Miðberg, Hanus Sørensen, Frits Johannesen, Magni á Lakjuni, Anna Mohr, Anita Samuelsen, Høgni Thomsen, Eyðun av Reyni, Hedvig Johansdóttir og Torbjørn Olsen.

– Øll eru hjartaliga vælkomin, siga fyrireikararnir.